


JÁKUP SØRENSEN, SAMSKIPARI HJÁ NORA, MAGNUS MAGNUSSEN, MASKINVERKFRØÐINGUR HJÁ SEV, OG FINN JAKOBSEN TEKNISKUR STÓRI HJÁ SEV, FRAMMAN FYRI HØVUÐSSÆTIÐ HJÁ SEV VIÐ TRIMUM AV ELBILUNUM

# Ráðstevna og royndarkoyring av elbilum

Tekstur: Magnus Gunnarsson · Myndir: Álvur Haraldsen

**Elfelagið SEV saman við Jarðfeingi skipar fyri eini ráðstevnu um elbilar í Norðurlandahúsinum týdagin 15. februar. Umframt framløgur um elbilar í Norðurlondum verða eisini royndarkoyring av fleiri ymiskum elbilum**

Týsdagurin 15. februar verður ein søguligur dagur. Tá verður fyri fyrstu ferð hildin ein ráðstevna um elbilar í Føroyum.

Tað er Elfelagið SEV sum saman við Jarðfeingi skipar fyri elbiladegnum í Norðurlandahúsinum. Elbiladagurin er liður í eini norðurlendskari verkætlan, sum er stuðlað av NORA (Norrønt Atlantssamstarv) og umfatar Grønland, Ísland og Føroyar.

Verkætlanin hevur sum endamál at testa elbilar í norðurlendsku samfeløgunum. Til dømis hvussu battaríini klára seg í ymiskum temparaturi og hvørja ávirkan økt nýtsla av elbilum fer at hava á framtíðar ferðslu. SEV umboðar Føroyar í verkætlanini og mannar saman við Jarðfeingi ein arbeiðsbólk, sum millum annað samskipar dagin í Norðurlandahúsinum.

Elbiladagurin í Norðurlandahúsinum byrjar týsmorgunin kl. 8.30. Gjøgnum dagin verða fleiri framløgur. Føroysku luttakararnir verða: Hákun Djurhuus, Finn Jakobsen, Dánjal Jógvan Hansson og Terji Nielsen frá SEV, og Jákup Sørensen frá NORA. Donsku luttakararnir verða Jacob Munch Jensen frá DONG Energy, Jan A. Petersen frá Vikingegaarden, Henrik Isaksen frá Choos-EV og Esben Pedersen frá Tesla Motors. Íslendsku luttakararnir verða Guðrún Lilja Kristinsdóttir og Jón Bjørn Skúlason frá Icelandic New Energy og grønlendska umboðið verður Jens H. Nielsen frá Nukissorfiit. Aftaná framløgurnar verður høvi hjá fólki at seta spurningar og kjakast um evnið.

Eisini verður høvi at royndarkoyra trý ymisk merkir av elbilum, tilsamans fimm bilar: tveir Peugeot Partner Van Electric, tveir Mitsubishi iMiEV og ein Tesla Roadster, sum kemur mánamorgunin við Norrönu.




MAGNUS MAGNUSSEN SETUR ELBILIN TIL LØÐA

Finn Jakobsen, tekniskur stjóri í SEV, sigur, at hann væntar sær nógv av hesum degnum og vónar at fólk veruliga nýta høvið at seta spurningar og kjakast um evnið.